Tórbjørn er n‡ggjur landsst‡risma›ur

Fríggjadagin n‡tti løgma›ur síni forrættindi og tilnevndi Tórbjørn Jacobsen til n‡ggjan landsst‡rismann. Peningur er eisini funnin til lønina

JOHN JOHANNESSEN

Klokkan 17 fríggjadagin gjørdist Tórbjørn Jacobsen n‡ggjur landsst‡risma›ur í undirvísingar- og mentamálum.

Avger›ina at seta hann tók løgma›ur fyrrapartin fríggjadagin.

Løgma›ur sigur orsøkina til avger›ina vera ni›urstø›una hjá løgfrø›ingunum í Tinganesi, sum siga, at treytaleysa valdi› hjá løgmanni at skipa landsst‡ri›, sum hann vil, viga tyngri enn játtanarlógin.

Tískil ber til hjá løgmanni at seta til sí›is greinina í st‡risskipanarlógini, sum sigur, at eingin útrei›sla má ver›a goldin uttan løgtingsheimild.

Hevur funni› pening

Orsøkin til, at løgma›ur higartil ikki hevur vága› sær at tilnevnt Tórbjørn Jacobsen sum landsst‡rismann, er nevniliga greinin í st‡risskipanarlógini, sum sigur, at hann ikki kann n‡ta pening uttan løgtingsheimild.

Løgma›ur hevur veri› bangin fyri, at um hann setti landsst‡rismannin uttan játtan, kundi hann fáa landsst‡rismálanevndina eftir sær.

Løgma›ur hevur funni› út av, hvussu hann kann tilnevna landsst‡rismannin uttan játtan til lønina og uttan at fáa landsst‡rismálanevndina eftir sær – í øllum førum fyribils.

Loysnin er, at játtan er til landsst‡rismannalønina hjá Signari á Brúnni ári› út. Men Signar á Brúnni skal ikki hava løn longur enn til fyrsta oktober.

Tí fer løgma›ur at n‡ta lønina hjá Signari á Brúnni fyri november og desember til at rinda løn til Tórbjørn Jacobsen fyri august og september.

Má hava eykajáttan seinni

Loysnin hjá løgmanni er tó bert ein fyribils loysn. Tí, tá hann brúkar játtanina fyri november og desember í august og september, kemur peningur sjálvsagt at resta í aftur, tá vit koma til november mána›.

Trupulleikan er løgma›ur sjálvsagt varugur vi›. Men hann ætlar sær at loysa trupulleikan vi› at bi›ja tingi› eykjáttan fyri hesar mána›ir, tá tingi› kemur saman aftur.

Gera Glata›u spælimenninar til film

Gongst sum ætla›, ver›ur bókin hjá Wiliami Heinesen at síggja sum sjónvarpssendirø› um tr‡ ár. Talan er um eina verkætlan á 20 miliónir, sum Sjónvarpi› skal standa fyri

JOHN JOHANNESSEN

Fæst ney›uga fíggingin, ver›a fyrstu myndirnar tiknar upp til sendirø›ina um skaldsøguna hjá Wiliami Heinesen longu næsta summar.

Ta› er føroyingurin, Helgi Toftgaard, sum arbei›ir sum framlei›slustjóri hjá danska felagnum, MTV, i› hevur fingi› hugskoti› at gera heimskendu skalsøguna til sendirø›.

Helgi Toftegaard hevur tosa› vi› ymsar sjónvarpsstø›ir um ætlanina, og er dramadeildin hjá DR sinna› at stu›la ætlanini vi› tí kravi, at filmurin ver›ur gjørdur í Føroyum á Føroyskum, og at Sjónvarpi› skal standa fyri verkætlanini.

SVF vil vera vi›

Sjónvarp Føroya heldur hugskoti›, um at gera bókmentanarliga meistaraverki› hjá Wiliami Heinesen til film, vera frálíkt. Tí er Sjónvarpi› eisini sinna› at standa fyri verkætlanini, um ney›uga fíggingin fæst til vega.

Talan er um eina verkætlan, i› kostar millum 15 og 20 milliónir krónur. Men hetta ræ›ir ikki Sjónvarpi›.

Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri›, sigur vanliga mannagongd vera, at stórur partur av fíggingini til slíkar verkætlanir eru stu›ul úr ymiskum nor›urlendskum mentanargrunnum, og tí kemur ein slíkur filmur ikki at kosta Sjónvarpinum ta› stóra.

– Ta›, vit koma at leggja í eina slíka framlei›slu, er tøknin, fólkini og samskipanin. Tí kann næstan sigast, at vit gjalda okkara lut »in naturalia«, sigur sjónvarpsstjórin.

Tróndur Djurhuus vísir á, at tá ta› ræ›ur um rei›an pening, kann Sjónvapi› ikki gera anna›, enn at standa fyri at savna ein part av honum inn.

Men fyri, at ta› skal bera til at gera filmin, heldur sjónvarpsstjórin, at ætlanin krevur undirtøku frá meginpartinum av føroyska mentanarlívinum.

Fyrireika› sí›ani 94

Ætlanin um at gera film úr skaldsøguni gongur heilt aftur til 1994. Tá fekk Helgi Toftegaard rættindini til at gera skaldsøguna til film.

Sí›ani hevur Helgi Toftegaard arbeitt vi› at finna út av, hvussu skaldsøgan kann gerast til film. Hetta, sigur hann, hevur veri› eitt ógvuliga torfført arbei›i, i› fleiri hava royndt á›ur, men eru givin, tí tey ikki fáa ta› at bera til.

Orsøkin til, at ta› ikki er eydnast fólki at gera skaldsøguna til film er, at hon er skriva› sum ein symfoni. Søgan hevur fleiri tema, i› koyra móti hvørjum ø›rum, eins og ein symfoni hevur fleiri satsir.

Í einum sjónvarpsfimli hevur ta› t‡dning at hava ein rey›an trá›, sum gongur gjøgnum allan filmin.

Men Helgi Toftegaard hevur loyst hendan trupulleikan vi› at gera skaldsøguna til sendirø›. Tí í eini sendirø› ber til at flætta smáu søgurnar inn.

Drúgvar royndir

Helgi Toftegaard, sum skal vera framlei›slustjóri, tá sendirø›in ver›ur gjørd, hevur drúgvar royndir innan filmsheimin.

Føroyski framlei›slustjórin hevur millum anna› sta›i› fyri at gera Robinson ekspeditiónina og Rasmus Tøpp.



um 3 ár fáa Føroyingar høvi at síggja Glatu Spælimenninar á sjónvarpsskíggja

Tríggir n‡ggir dómarar

Danska rá›i›, sum tilmælir dómarar fyri Føroyar, hevur mælt rá›num, sum tilnevnir dómarar, at seta tríggjar n‡ggjar dómarafulltrú›ar í Føroyum.

Tveir av n‡ggju dómarafulltrú›unum eru føroyingar, og ein teirra er dani. Føroyingarnir eru Kári á Rógvi, sum í løtuni arbei›ir sum skrivari hjá grundlógarnevndini, og Anna Sólvá Olsen, sum arbei›ir sum advokatfulltrú› í Danmark. Danin er Hendrik Bang Nielsen, sum starvast sum fulltrú›i hjá danska heilsumálast‡rinum.

Kári á Rógvi, sum starvast sum skrivari í grundlógarnevndini, er ein teirra, sum ver›ur n‡ggjur dómarafulltrú›i